# Ein avgamal sálmur til nútíðar ungdóm

Røddin hjá Heina Lützen er søgd at vera tann besta í Føroyum. At tað veruliga er so, fingu ferðafólkini umborð á Norrönu at sanna í farnu viku, tá hann framførdi nakrar av hjartasangum sínum á árliga gospeltúrinum



SANGFUGLUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Norröna:** Tað er fullsett her í Viking Club. Tað er konsert og á palli stendur Heine Lützen.

Sær við lið hevur hann góðar og royndar tónleikarar, sum allir brenna fyri at sangur og tónleikur skulu ganga saman hond í hond. Tilfarið hetta kvøldið er bæði nýtt og gott gamalt.

– Eg veit ikki, um eri blivin í ørviti. Men mær dámar sera væl at syngja gamlar sálmar.

– Eg haldi, at teir siga so nógv. Nú fari eg at syngja ein ordiliga gamlan – ein frá 1681!, kunngerð Heine.

Sangurin er »Harmur og gleði í felag tey reika«, sum Kingo yrkti hetta árið og sum Christian Matras umsetti til føroyskt 240 ár seinni. Lagið er tað, ið m.a. varð nýtt í filminum um Barbaru.

Hábærsliga og inniliga syngur Heine henda sangir, soleiðis at hann veruliga bergtekur áhoyrarnar. Sjáldan áður man ein sangur sum hesin hava verið so væl framførdur.

Sjálvt teir mest inniligu og vælskrivaðu sálmarnar frá eini farnari tíð fær hann latið í ein slíkan búna, at sjálvt ung nútíðarmenniskju geva sanginum – og boðskapinum! – gætur.

Hetta er eitt kynstur, sum ikki øll duga og megna. At tað er EIN sum megnar hetta fekst fullgott prógv fyri umborð á Norrönu um vikuskiftið.

### Trúfastur tónleikavinur

Tað er neyvan neyðugt at greiða nágreiniligt frá, hvør Heine Lützen er.

Tey sum bert vita eitt sindur um tónleik munnu kennast við mannin – og kanska serliga eyðkendu rødd hansara.

Hann hevur verið at hoyrt í samband við tiltøk í kristiligum samkomum, og við tiltøkum sum ymiskar samkomur hava skipað fyri.

Heine hevur verið nógv at hoyrt við vakra sangi sínum á teimum trimum útvarpsrásunum, og hansara fløgur munnu vera at finna í rættiliga nógvum føroyskum heimum.

Hansara eyðkendu og vøkru rødd fingu eisini ferðafólkini við Norrönu møguleika at hoyra nú um vikuskiftið, tá Smyril Line skipaði fyri serstøkum gospel-túri.

Við fleiri av tiltøkunum umborð sang Heine, annaðhvørt afturvið tónleikabólki ella trúfasta tónleikavini sínum, Jónsvein Heinesen á guittara.

### Lívssæla vissa

Aftur til konsertina. Heine hevur júst sungið kenda sangin »Vit vóru orsøk«, sum kann eins væl nýtast í samband við jól ella páskir.

Hann syngur nakrar sangir aftrat, men ger nú greitt, at ætlan hansara er at skifta stíl – ikki bara eitt sindur, men fullkomuliga.

– Eg fari nú at syngja ein kendan sang – í blues!, kunngerð hann fyri spentu áhoyrarafjøldini í Viking Club.

Hetta eru helst nýggir tónar frá honum, og tú sært fólk rætta seg upp í stólin: Heine syngja blues?! Hoyrdu vit rætt?!

– Hetta er ein sangur, sum nógv av tykkum kenna innihaldið í. Men kanska ikki í blues-útgávu, sigur Heine.

– Sangurin er Lívssæla vissa, sigur Heine, og setur tónleikararnar í gongd.

Lívssæla vissa, Sælasta vissa ella Blessed Assurance – kendur sangur, sum er farin víða, og sum verður sungin á alskyns tungumálum kring allan heimin. Og nú altso í bluesútgávu umborð á Norrönu!

Sangurin varð sum heild sera væl móttikin av teimum yngru, – men treyðugt so: Onkur helt ikki, at hetta var mátin at syngja ein slíkan góðan sang uppá.

Hinvegin, so kom boðskapurin týðiliga og greitt fram. Og tað var helst endamálið hjá Heina.

### Ófatandi

Komið er nú miðskeiðis í konsertina, og Heine hevur rættiliga sungið seg heitan her í Viking Club.

Ein blues'ari kemur aftrat, áðrenn nýggir tónar skulu út til spentu áhoyrarafjøldina.

– Eg veit ikki, hvussu nógv av tykkum lurta eftir Lindini. Men har er ein sending, sum hevur eitt serstakt eyðkennislag.

– Tað er sendingin hjá Jenisi av Rana, har hann spælir hetta lagið. Á føroyskum kallast tað "Kærleiki ófatandi", og tað fari eg nú at syngja, sigur Heine.

Hetta er ikki ein nýggjur sangur, tí Charles Wesley yrkti hann á sinni. Og tá ein sigur "á sinni" so er tað í øllum førum áðrenn 1788, tí tá andaðist yrkjarin.

Heine letur nú henda sangin í ein nýggjan búna, og afturvið góðum munnharpu-spæli frá sangaranum sjálvum fer hesin sangurin eisini upp í hæddirnar.